LM-099/2023

Fylgiskjal 88

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes, Postrúm 64
110 Tórshavn

Tórshavn tann 23.02.2024

Hoyringsskriv til Lóg um Burðardygga Ferðavinnu

Vísandi til áheitan um at lata inn ummæli/hoyring til lógaruppskot um Burðardygga Ferðavinnu á heimasíðu hjá Uttanríkis- og Vinnumálaránum, koma vit her við okkara viðmerkingum.

Vit hava gjøgnumgingið uppskotið og luttikið á 2 almennum hoyringsfundum og hava hesar viðmerkingar og ummæli til lógaruppskotið.

1) Viðmerkingar til §1
   Grein 1 í lógini er endamálsorðingin. Hesi yvurskipaðu endamálsorðing hava vit onga atfinning til, men meta at ymiskar greinar í lógini stríða ímóti hesi endamálsorðing. Vit útgreinað hesi undir teimum relevantu greinunum.

   Í viðmerkingunum til Grein 1 fýlast vit á, at endamálið við uppskotinum tykist vera at snikka eina lóg saman, ið skal fáa lógarverkið broytt til at samsvara við marknaðarføringina hjá Visit Faroe Islands og ikki øvugt. Hetta meta vit vera óheppi, tí tá tekur lógaruppskotið ikki støði í verandi ferðavinnu og teimum tilboðum, ið við góðum samstarvi kring landið longu eru til og sum virka sera væl. Hettar lógaruppskotið tekur grundarstøði undan verandi ferðavinnutilboðum úti um landið, heldur enn at skapa tryggari kjølfesti fyri hesi.
   Eisini leggja viðmerkingarnar upp til, at útferðaveitarar og staðbundnir veitarar (primert bóndir), frammyvir skulu kappast við eitt ókeypis tilboð, ið lógaruppskotið loyvir útlendskum ferðandi at fáa. Ein slík kappingaravlaging fer mest sannlíkt at minka um inntøkur hjá útjaðarinum, heldur enn at betra um hesar.

2) Viðmerkingar til §2
   Grein 2 lýsir hugtøkini brúkt í lógini og tykist stórsta mótstøða í hesi grein vera orðingin «brúkari» um festibóndur.
   Sum skilt á Landstýrismanninum á hoyringsfundi í Klaksvík tann 22.02.2024, so verður tann orðingin broytt.

   Eisini vildu vit ynskt, at ymsu greinarnar innan sjálva ferðavinnuna blivu sundurdeildar nakað meira, heldur enn at koyra allar ymsu vinnugreinanar innan ferðavinnuna í ein og sama pott.
   Her hugsa vit millum annað um:
   Stóru flutningsfyritøkurnar (Atlantic Airways, Smyril Line, SAS osfr,)

Líttlu flutningsfyritøkurnar (bussfeløg, bátar ið sigla innanoyggja osfr.)
Gistingarhús og AirBnB
Incoming feløg og størru ferðasmiðir (Greengate Incoming, 62n osfr.)
Utferðaveitarar (Faroeway, Tora Turist, MB Tours osfr.)
Einstaklingar (Einstaklingavirkir við egnum ferðaleiðara og flutningi)
Bóndir, ið reka útferðir og tilboð í haga og bøi teirra osfr.
Matstovur (Koks, Áarstova, Muntra osfr.)
Heimablídni (Garðahúsið, Anna og Óli osfr.)
Mat- og drekkaveitarar á smáplássum umframt kaffistovur, pylsuvognar osfr.

Fleiri av hesum bólkum samstarva sera væl til dagligt, men áhugamálini og ynskini hjá ymsu vinnubólkunum eru sera mótstríðandi á fleiri økjum. Eisini sakna vit eina breiðari umboðan av hesum ymsu vinnubólkunum í ferðavinnunið í nevndini hjá Visit Faroe Islands.

Annars hava vit onga aðra viðmerking til hesa grein.

3) Viðmerkingar til §3
Grein 3 er meint, sambært Landstýrismanninum, at veita føroyingum ein lógartryggjaðan rætt til at ganga í føroysku náttúruni. Hetta hava vit onki ímóti, men vilja viðmerkja, at orðingin í lógini er nakað ógreið um júst hettar og kann tað geva tulkingartrupuleikar, har útlendsk ferðandi kunnu fáa tað fatan, at hettar eisini umfatar tey.
Tískil mæla vit til, at orðingin í greinini blívur broytt til «er einum og hvørjum føroyingi frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini.»

Eisini mæla vit staðiliga til, at tað verður gjørt púra greitt í lógini og í kunning til øll útlendsk ferðandi, at sonevnda «Náttúrugjaldið» IKKI gevur teimum rætt til at ferðast frítt eftir grein 3.
Eisini mæla vit til, at útlendsk ferðandi ikki blíva undantikin at gjalda fyri at fara í hagan, tá talan ikki er um almennar leiðir. Her hugsa vit ferðslu eftir almennum vegum og varðagøtum millum bygdir sum «almennar leiðir».
Skulu tey ferðandi gjøgnum hagar eftir náttúrugøtum ella har gøta annars er gjørd av avvarðandi bóndum, so eiga tey at gjalda fyri tað. Higartil hevur felag okkara onga neiliga viðmerking fingi frá okkara túsundtals gestum hvørt ár um, at tey skulu rinda «gongugjøld» til bóndan. Tey síggja tað sum eina sjálvfylgju og gjalda tað fegin.
Vit kenna okkum sostatt yvurhøvur ikki aftur í almennu atfinningunum frá m.ø. Visit Faroe Islands, um at gongugjøld eru ein forðing fyri útlendingar at velja at vitja Føroyar.

4) Viðmerkingar til §4
Grein 4 lýsir atlit og fyrilit, ið ferðandi uttangarðs skulu vísa. Hendan ásetingin í lógini er nakað ógreið um, júst hvørji atlit og fyrilit skulu haldast og tulkast.

At bert skriva í lógina, at tey ferðandi ikki mugu vera «at skaða ella ampa» er ein sera breið orðing, ið ikki hevur nakra praktiska avmarking í sær.

Stk. 2 um bátar hava vit ikki nakra ítøkiliga viðmerking til.

Stk. 3 at tað er bannað at taka gróður, egg, steinar og grót við sær úr haganum, er ein fín áseting á pappírinum, men hevur als ongan virkna praktiskt. Einasti háttur at tryggja, at slíkt ikki fer fram, er við at seta ófrávíkiligt krav um, at øll ferðandi skulu hava ein føroyskan ferðaleiðara við sær, tá tey fara út um bøgarðin.

Stk. 4 gleðast vit stórliga um, at tað blívur nokta øllum, uttan í samband við seyðahald, at hava hund við sær í hagan.

Stk. 5 gevur bóndanum heimild at vísa burtur fólkið úr haganum, um tey bróta ásetingarnar í grein 4.
Her sakna vit heimild til føroyskar ferðaleiðarar, at fáa sama mynduleika. Hesin eigur at verða skipaður og givin í samráð við avvarðandi bónda.
Nógva staðni kring landið eru bóndirnir ikki førur fyri at virka sum ferðaleiðarar á ogn síni og hava fleiri av teimum gjørt avtalur við føroyskar ferðaleiðarar, at hesi ganga í haga teirra. Tískil kann lógin tryggja ásetingarnar í grein 4 munandi sterkari, um ferðaleiðarar eisini fáa heimild at vísa fólkum burtur úr haganum, um hesi bróta ásetingarnar í lógini.

5) Viðmerkingar til §5
Grein 5 er sera ógreið og mótsigur beinleiðis sær sjálvum.
Stk 1 sigur, at handilslig ferðavinna einans kann útinnast í samráð við bóndan. Hettar taka vit undir við, men sakna eina greiðari áseting av hvat «handilslig ferðavinna» er. Sum vit lesa og tulka lógina nú, so eru stór ivamál, millum annað viðvíkjandi firmaútferðum hjá føroyskum fyritøkum, ið hava ferðaleiðara við sær í hagan.
Eru hesi tá ikki undir tulkingini av «handilsligari ferðavinnu», ella eru tey per definitión í grein 3 undantikin?
Slík ivamál fara heilt víst at taka seg upp og sakna vit eina greiðari orðing av slíkum dømum.

Stk 2 í grein 5 er beinleiðis í andsøgn við stk 1 og og meta vit, at hon fer at skapa mangar illstøður millum bóndir og ferðasmiðir.
Um ein bóndi krevur gjald, afturfyri at ferðasmiður sendur útlendskan bólk við ferðaleiðara í haga hansara/hennara, so kann ferðasmiðurin bert nokta og sostatt tvinga bóndan niður á sonevndu «standardavtaluna», ið Landstýrismaðurin skal gera sambært stk 3 í lógini. Alt eftir hvat kostnaðarstøði Landstýrismaðurin ásetur í hesi «standardavtalu», kemur henda orðingin í stk 2 at skapa skilnað og óvilja millum ferðasmiðir og bóndir kring landið. Eitt ið er ógvuliga óheppi, nú útferðavinnan í mong ár hevur havt eitt framúrskarandi gott samstarv við bóndir kring landið.

6) Viðmerkingar til §6

Grein 6 leggur sera stórar byrðar á kommununar, serliga tær smáu, ið tær neyvan megna at lyfta. Partur kommununar av sonevnda «náttúrugjaldinum» fer ikki at dekka tann kostnað, ið útbygging og viðlíkahald av verandi ferðavinnuinfrakervi krevur. Sannlíkt er, at manga staðni fara farleiðir, gøtur, parkeringsumstøður, almenn wc og slíkt at dragna afturúr av hesum.

Mangar av hesum alneyðugu útbyggingum og nýbyggingum eru lokalu bóndir og smápláss longu í ferð við at planleggja, keypa sær tilfar til og útvega neyðugu maskinur at byggja. Hettar er alt fíggja av verandi «gongugjaldið», ið hendan lógin ger ólógliga og tekur frá bóndunum og smáplássunum. Mangir bóndir hava snøgt sagt ikki stundir til at veita tænastur og ganga í haganum við ferðafólkum, tí so fellur garður teirra í órøkt. Háárstíð fyri ferðavinnuna fellur saman við mest tíðarkrevjandi tíðarskeiði fyri bóndan, har lembing, hoygging og slakt skal gerast, umframt tað dagliga á garðinum.

Tískil meta vit ikki, at tað er ein haldgóð loysn at banna sonevndu «gongugjøldunum», ið grein 12 í lógaruppskotinum fremur. Hesi «gongugjøld» ella «gjaldsportur» eru ein góð eyka inntøka hjá alt fleiri bóndum kring landið og sum okkara túsundtals ferðandi gjalda við gleði.

Vit kenna okkum snøgt sagt als ikki aftur í pástandinum hjá VFI, at hesi «gongugjøld» eru ein forðing fyri ferðavinnuna ella at tey gera tað torførari at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál.

Tann bólkur av ferðafólkum, ið vit nevna «grøn ferðandi», ið hugsa sera nógv um útlát og atlit til náttúruna, spyrja enntá oftani um tey ikki kunnu sleppa at gjalda eyka til bóndan, tí tey nevniliga vilja stuðla teimum í teirra verkætlanum.

Eisini vilja vit mæla til, at um kommununar skulu gera ferðavinnuætlanir fyri hvørt økið í kommunum teirra, so eigur bóndin at hava meira at siga í hesum, enn bygdafólkið og kommunan. Tað er hóast alt teirra ogn/festi, ið lógin og ferðavinnuætlanin koma at ávirka mest.

Í Stk 2 punkt 4, vilja vit heita á landsmynduleikan at broyta eitt grundleggjandi mistak í verandi meting av torleika- og váðametingunum kring landið.

Hesi samsvara ikki við hvat útlendingar meta hesar farleiðir verða, tí alt ov ofta eru metingarnar gjørdar út frá føroyskum metingum og ikki hvat útlendingar meta.

Til stk 2 punkt 5 vilja vit vísa á, at tað ber ikki til at avmarka ferðslu ella tal av ferðandi til einstøk økið kring landið, har landfast er. Sjóvegis er ein náttúrligur «proppur», ið eru skipini og bátanir, ið føra ferðafólkini til og frá hesum oyggjum. Har ber til at seta eina náttúrliga forðing inn. Har landfast er ber tað snøgt sagt ikki til at avmarkað tal av ferðandi, tí flestu bíleggingar av útferðum koma árið fyri, har prísur eisini blívur avtalaður, men túrurin blívur ikki endaliga váttaður, fyrr enn rímiliga stutt uppundir komu til landið.

Tískil ber tað ikki til hjá útferðavinnugreinini at planleggja, selja ella útinna útferðir til økir við slíkum avmarkingum. Tað bar Tjørnuvík eitt greitt dømi um, har flestu útferðaveitarar bert strikaðu Tjørnuvík sum ferðamál og vitjaðu als ikki har.
Tískil komu mestsum einans «leysgangarir», e.g. útlendingar í egnum ella leigaðum bili, ið als ikki eru skipaðir ella vanliga vísa virðing fyri atliti, atburði, atgongd ella avmarkingum.
Tí slepti kommunan eisini øllum teimum tiltøkum, ið tey annars høvdu havt áður, ið skuldu avmarka ferðsluna til Tjørnuvík. Hesi riggaðu milt sagt yvurhøvur ikki.

Til stk 3 hava vit eina áheitan og er hon at lógin kemur at leggja upp til, at lokalu ferðavinnuætlaninar fyri økini kunnu staðfestast av kommunustýrinum og fáa virkna frá tí degi, so ikki skal bíðast eftir Landstýrismanninum og hansara umsiting at góðkenna hesar í smálutir.
Her hava vit eisini tað meining, at Landstýrismaðurin hevur tilskriva sær alt ov víðar heimildir og mynduleika yvir ábyrgdarøkir, ið hann í lógaruppskotinum annars hevur lagt út til kommununar.

7) Viðmerkingar til §7
Til grein 7 í lógaruppskotinum hava vit einans tað viðmerking, at vit meta at sjónarmið bóndans eiga at hava stórri tyngd í samband við ferðavinnuætlanir enn bygdafólkið.

8) Viðmerkingar til §8
Her leggur Landstýrismaðurin alla ábyrgd av gerð, viðlíkahaldið og kostnaði av ikki-almennum farleiðum út til kommununar. Sostatt eigur heimildin at áseta reglur og ferðavinnuætlanir at liggja endaliga hjá kommununum og bóndanum í felag og ikki hjá Landstýrismanninum. Heimildin eigur at fylgja ábyrgdini og fíggingini í einum fólkaræði.
Eisini sakna vit, at bóndin fær møguleika at staðseta, byggja og útvega fígging av gøtum í haga teirra, í samráð við avvarðandi kommunu. Her kemur møguleikin hjá bóndanum at taka «gongugjald» aftur í spæl sum ein náttúrlig leið.

9) Viðmerkingar til §9
Til grein 9 meta vit, at tað er ein góð leið at ganga, at hvør bóndi sær, saman við kommununi men tó har ynski bóndans viga mest, sleppa at seta ávísar ásetingar og reglur fyri, hvussu ferðslan skal skipast í teirra haga.
Tó meta vit ikki, at tað er ein gongd leið at Landstýrismaðurin skal hava evsta mynduleikan til at góðkenna og kunngerða hesar reglur. Her tekur Landstýrismaðurin sær sjálvum alt ov stórt vald, eftir okkara tykki. Eitt annað er eisini, at um hvør hagi, saman við kommununi, skal fáa sínar reglur lýstar í kunngerð, blívur nøgdin av slíkum kunngerðum so ovurstór, at tað blívur ein umsitingarlig marra hjá vinnunið at finna runt í.

Eisini fer tað at læsa hesi atlit í eina sera stirvna skipan, so bóndin og kommunan ikki leypandi kunnu gera broytingar og tillagingar, alt eftir hvussu ferðamynstri avdúkar nýggjar vandar, órógv ella onnur atlit, ið ofta tørva skjótar broytingar.

10) Viðmerkingar til §10

Vit hava ikki nakrar viðmerkingar til grein 10, tó meta vit at slíkt ikki eigur at vera í eini ferðavinnulóg, men heldur í lógarverkinum fyri náttúrufriðing ella landbúnaði.

11) Viðmerkingar til §11

Í grein 11 meta vit, at heimildin at krevja staðkendan ferðaleiðara eftir stk 1 ella at kunna steingja ávís økir sambært stk 2, eigur at liggja hjá bóndanum og kommununi í felag og ikki hjá Landstýrismanninum.

Aftur her leggur lógaruppskotið upp til eitt sera tungt umsitingarligt stríð, ið ikki tænir bóndunum ella ferðavinnuni á nakran hátt. Tá tillagingar ella broytingar mugu gerast, skal hettar kunna gerast við virknaði í stundini og eigur á ongan hátt at skula bíða eftir Landstýrismanninum ella umsiting hansara.

12) Viðmerkingar til §12

Í stk 1 bannar lógaruppskotið "gjaldsportur, stongsil ella aðrar forðingar».

Hetta meta vit vera sera óhóskandi og fer tað at kosta bæði bóndum og okkum ferðasmiðum sera stórar inntøkur, umframt størv í vinnunið.

Fyri okkum er tað ein sjálvfylgja, at bóndin skal hava nakað afturfyri, at vit órógva og gera brúk av haga hansara/hennara. Tíverri eru ikki øll í vinnunið samd um hettar og ynskja fleiri «gongugjøldini» avtikin, so tey kunnu behalda meira av sølu síni og spara útreiðsluna til bóndan. Her er egoisman ráðandi og ikki atlit ella virðing fyri bóndum og útjaðara. «Standardavtala» Landstýrismannsins, ið hann ætlar skal viga upp fyri hesum, blívur tí tað besta ið bóndin kann vóna at fáa afturfyri og ikki eitt minstamark.

Eisini fer bannið av «gjaldsportrum» at ávirka vinnuna neiliga og kosta okkum dýrt í mistari sølu, so skjótt ferðafólkini finna út av, at teimum nýtist ikki gjalda okkum fyri ferðaleiðarar ella tænastur, tí «náttúrugjaldið» gevur teimum frítt at fara hesar gøtur sambært grein 3.

Vit kunnu eisini, um vit einans hugsa vinnuligt, spara stórar upphæddir til bóndan, við at ikki bjóða ferðaleiðarar ella tænastur á mest vitjaðu plássunum, men bert halda ein steðg har, so langa tíð sum tilhoyrandi gongutúrur tekur.

Sostatt er talan ikki longur um «handilsliga ferðavinnu», tí vit hvørki taka gjald ella veita tænastu, og tískil kunnu vit bara standa har og bíða, meðan ferðafólkini ganga ókeypis til ferðamálið og aftur.

Um «gjaldsportur» framhaldandi blíva loyvd, sleppur onki ferðafólk uttan tilknýti til Føroyar ella føroyingar út í hagan, uttan at peningur liggur eftir í nærumhvørvinum og hjá bóndanum.

Tískil meta vit, at grein 12 í lógaruppskotinum er í beinleiðis stríð við ásetingarnar í grein 1 í lógini, tí her hvørva inntøkur, lønsemi, arbeiðspláss og atlit til trivna og vinnumøguleikar á ein sera einfaldan hátt.

13) Viðmerkingar til §13

Viðmerkingarnar til «náttúrugjaldið», annað enn at tað má gerast púra greitt, at hettar ikki kemur í staðin fyri nakað lokalt gjald og ikki gevur nøkur serlig rættindi at ferðast uttanfyri almennar farleiðir.

Eisini sakna vit eitt avgjald á útlendskar bilar og bussar, ið áttu at goldið ein «vegskatt» við komu til Føroyar og so leingi tey vóru her.

Eisini sakna vit, at lógin skal gera greitt ella kunna um, at ikki-norðurlendingar hava ikki loyvi at virka sum ferðaleiðarar, bussførarar ella reka ferðavinnuvirksemi í Føroyum. Hettar er staðfest í svarið til VFI frá Udlændinge- og Integrationsministeriet tann 11. juni 2020, har víst verður til útlendingalógina §13, stk.1, §9, stk.2 nr.3, §9, stk 2. nr.4 og í bekendtgørelsens §34, stk.1 nr.3. Hettar skjal festa vit við til hettar ummælisskriv.

14) Viðmerkingar til §14

Til grein 14 hava vit tað viðmerking, at «náttúrugjaldið» á ongan hátt kemur í nær námind av teimum inntøkum, ið hettar lógaruppskot niðurleggur við grein 12.

15) Viðmerkingar til §15

Vit hava ongar viðmerkingar til grein 15, annað enn at vit meta slíkt hoyra heima í Náttúruverndarlógini ella Landbúnaðarlógini og ikki í eini lóg um ferðavinnu.

16) Viðmerkingar til §16

Vit hava ongar viðmerkingar til grein 16.

17) Viðmerkingar til §17

Vit vilja vísa á, at ferðavinnan virkar langt fram í tíð. Okkara sølutilfar, prísir og avtalur í ár eru øll til sølu av útferðum, ið koma at blíva útintar næsta ár, í 2025.

Hendan lógin leggur upp til eina sera stóra óvissu, ið er ótolandi fyri ferðavinnuna sum heild og sum fer at fáa sera stóra neiliga fíggjarliga ávirkan á sølu og inntøkur. Lógin og gildiskoma má taka atlit til hettar faktum, at ferðavinnan ikki kann virka við broytingum frá degi til dags, men má hava eina trygga og framtíðartryggjaða leið við avtalum, prísum og atgongd.

18) Viðmerkingar til §18

Vit hava ongar viðmerkingar til grein 18.

Almennar viðmerkingar

1) Til punkt 1.3. í viðmerkingunum bíta vit merkið í, at her dagar marknaðarføringin hjá VFI undan sum politiska grundarlagið undir lógaruppskotinum og ikki atlit til verandi ferðavinnu og tey vinnurekandi, ið gjøgnum mong ár hava bygt sítt virksemi upp í góðum samstarvi við bóndir og onnur. Tað meta vit er sera óheppi.

2) Til punkt 1.5 í viðmerkingunum fílast vit á, at ongi verulig umboð fyri útferðarpartin av ferðavinnunið, annað enn áhugafelagið Ferðaleiðarafelagið, er við sum hoyringspartur av lógargerðini.

   Sum útferðasmiðir og ferðaveitari eru ongið umboð í listanum av hoyringspørtum. Ferðavinnufelagið umboðar langt frá alla ferðavinnuna og eru tey lobby-bólkur hjá limum teirra, ið eru allir stóru aktøranir í ferðavinnunið, ið allir hava tað felags, at nærum ongin teirra veitir útferðir ella hava nakað virksemi í høgunum kring landið. Tískil skilja vit ikki, at einans tey eru hoyrd sum umboð fyri okkum ferðasmiðum.

3) Til punkt 2.1 í viðmerkingunum vilja vit vísa á, at tann ovurstóri inntøkumissurin, ið vit meta bannið av «gjaldsportrum» leiðir til, fer at ávirka skatta- og mvg-inntøkur landsins, skattainntøkur kommununar og arbeiðsloysi í smábygdunum. Tískil meta vit ikki, at niðurstøðan í punkt 2.1 er sonn.

4) Til punkt 2.2 í viðmerkingunum vilja vit vísa á, at við teimum heimildum Landstýrismaðurin tilskilar sær sjálvum í lógini, fer nógv av ferðavinnunið fyri bakka, vegna alt ov nógv krøv um kunngerðir og góðkenningar frá Landstýrismanninum. Heldur mæla vit til, at hendan heimild blívur løgd til kommununar.

5) Til punkt 2.4 í viðmerkingunum skulu vit siga, at um ferðafólkini ikki blíva serstakliga væl kunnaði, at teimum ikki er loyvt at fara út um bøgarðar uttan loyvi, gjald ella føroyskan ferðaleiðara, so stendst ovurstórt slit og órógvan av teimum.

6) Til punkt 2.11 í viðmerkingunum hava vit viðmerkingina, at inntøkan frá «náttúruverndargjaldinum» á ongan hátt røkkur til alt tað, ið lógin leggur upp til. Her eru gjaldsportrini afturímóti ein sera góður háttur, hjá bóndum og harvið eisini viðkomandi kommunu, at útvega fígging til øll hesi átøk.

7) Til punkt 2.14 í viðmerkingunum siga vit eins og omanfyri, at lógin gevur Landstýrismanninum alt ov nógvar og víttfevnandi heimildir, ið vinnan als ikki kann liva við. Har broytingar skulu fremjast, má tað henda skjótt, ja oftani innan minuttir. Tískil meta vit, at heimildir til at steingja, broyta ella á annan hátt forða ferðafólkum at koma til ávíss økið, alt eftir umstøðum og vandum, eigur at liggja hjá bóndanum, sum aftaná kann fáa kommununa at lýsa tað ordiligt.

LM-099/2023

At Landstýrismaðurin skal sita við einum veto-rætti, um hvussu bóndir skulu stýra virkseminum í teirra egna haga, meta vit verða eitt groft brot á fólkaræði og frælsi.

8) Til punkt 2.17 í viðmerkingunum vilja vit siga, at hon als ikki er rættvísandi og tekur yvurhøvur ikki hædd fyri virkseminum hjá bóndunum ella útferðasmiðum. Hesi standa til álvarslig fíggjarlig bakkast, um lógin blívur viðtikin í verandi líki. Eisini útoyggjar og smábygdir koma at uppliva neilig fíggjarlig árin av lógini.

Sostatt meta vit ikki, at lógaruppskotið í verandi skapið leggur upp til nakran bata fyri ferðasmiðir, útferðaveitarar, bóndir í landbúnaðarferðavinnuni, ferðaleiðarar á smáplássunum og avvarðandi virksemi kring landið.
Eftir okkara tykki, tænir lógaruppskotið primert stóru aktørunum í ferðavinnunið, hvørs einasta endamál er at fylla so nógv ferðafólk inn í landið sum yvurhøvur til ber.
Okkara ynski er ikki, at nøgdin av ferðafólkum skal vaksa nakað serligt, men hinvegin at ferðavinnan, saman við bóndrunum, avvarðandi og tilknýttum vinnugreinum, skulu fáa munandi meira pening burturúr hvørjum ferðafólkið.
Tá tosa vit um veruliga burðardygd, ið eisini er eitt sera gott marknaðarførings-átak, ið vinnur alt meira fram altjóða.

Viðheft eru, saman við fyrrnevnda brævi, eisini avrit av 4 lesarabrøvum, har undirritaði hevur greitt gjøllari frá støðu okkara.

Vinarliga heilsan

Jógvan Hovshólm
Stjóri
Telefon: +298 911010
Fartelefon: +298 911011
jh@faroeway.fo
Sp/f Faroeway Adventures
Address: Brattabrekka 17, 100 Tórshavn, Føroyar
www.faroeway.fo

LM-099/2023

Eitt íkast til ferðavinnukjakið

Eg havi í skjótt tvey áratíggju verði virkin innan ferðavinnuna í Føroyum og sæð tað fantastisku menning, ið hon hevur upplivað hesa tíð. Fyrst sum parttíðar ferðaleiðari, seinni sum fulltíðarstarv tá tað loksins bar til og farnu trý árini sum dagligur leiðari og seinni stjóri í ferðaskrivstovu, ið skipar útferðir kring landið og veitir bussar, bussførarar og ferðaleiðarar til alt fleiri bólkar og einstaklingar.

Gjøgnum hesi ár hava vit havt eitt fyrimyndarligt samstarv við bóndur kring alt landið, tá tað kemur til gongd í haga og við bygdarfólkini, har vit hava vitjað kring landið. Har hevur ongantíð verið nakar trupuleiki, tí vit hava spurt okkum fyri og fingið loyvi frá bóndunum, umframt at vit hava brúkt so nógva "lokala" arbeiðsmegi sum til ber, so sum staðkendar ferðaleiðarar, heimablídni og føroysk tiltøk av alsksyns slag. Hetta hevur riggað avbera væl og hava vit lagt nógvan pening eftir okkum har vit hava vitjað.

Vit hava altíð tikið gongugjøld frá okkara ferðandi og latið bóndunum tað og ongin hevur nakrantíð klagað ella tosað illa um hesi gjøld. Øll okkara túsundtals ferðandi hvørt ár, hava goldið hesi gjøld við gleði, so skjótt vit hava greitt teimum frá, hvat og hvønn hesin peningur fer til.

Tey duga væl at síggja, at sjálvandi skulu bóndirnir hava okkurt afturfyri, at tey sleppa at njóta frálíku náttúruna, ið finst í høgunum. Eisini gjalda tey gleðiliga eyka, tá vit greiða teimum frá, at bóndin savnar sær pening til at gera gøtur og aðrar hentleikar, so sum wc, kaffistovur og líknandi, ið fer at koma næstu vitjandi væl við á teirra komandu ferðum higar.

Istaðin fyri at brúka Visit Faroe Islands og Ferðavinnufelagið sum vegleiðarar, áttu mynduleikanir heldur at spurt tey sum skipa fyri útferðum, ferðaleiðarar og tey sum longu fáast við ferðafólk úti um landið, har íroknað serliga bóndir, hvussu best er at skipa fyri. Hvat riggar og hvat riggar ikki – og so tikið tað harfrá.

Óumhugsað marknaðarføring av Føroyum sum eitt land, har øll kunnu fara allastaðni uttan avmarkingar, hava skapt stórar trupuleikar fyri ferðavinnuna kring alt landið. Tá ferðandi koma higar og uppliva, at tey ikki sleppa at reika sum teimum lystir, men skulu halda seg til gøtur, rinda gongugjøld og annars vísa skynsemi, so blíva tey sjálvandi ónøgd og klaga til VFI, sum tíverri hevur staðið fyri slíkari marknaðarføring. Tíbetur eru flestu ferðafólk skilafólk og halda seg til gøtur og ávístar leiðir, men so finnast nøkur sum als ikki hava vit og skil fyri at ganga í náttúruni. Fara í fjøllini og koma í óføri, so bæði tyrlur og nógv bjargingarmanning má avstað at leita – fyri okkara skattakrónur.

Hesi veruligu "óskipaðu" ferðafólkini hava øll tað til felags, at tey koma higar, leiga sær hotelkamar, leiga ein bil og fara so sum teimum lystir kring landið, uttan at leggja eina krónu eftir seg uttanfyri høvuðstaðin. Afturat tí kemur so tað óneyðuga slitið á náttúruna og órógvan av djóralívi, ið hesi bera við sær.

Tí vil eg heita á Landstýrismannin, ráðgevar í aðalráðunum og Løgtingsfólk, um at taka okkum ferðavinnurekandi við upp á ráð og virða okkara viðmerkingum hægri enn tær frá Ferðavinnufelagnum, Visit Faroe Islands og øðrum, ið ikki tykjast hava nakað serligt innlit í, hvussu ferðavinnan er og eigur at skipast kring landið so mest fæst burturúr, ikki minst til bygdasamfeløgini og náttúruna.

Ikki skal eg dylja, at vit meta verandi lógaruppskot um "Burðardygga Ferðavinnu" vera eitt risastórt bakkast fyri vinnuna, bygdirnar, útjaðarin, bóndur, samfelagsbúskap og ikki minst okkara viðkvomu náttúru.

Júst hvussu tað skal skiljast, vil eg at koma inn á og greina nærri komandu daganar.

Jógvan Hovshólm

Stjóri í Faroeway Adventures, ferðaskrivstova og útferðaveitari í Føroyum

LM-099/2023

Annað íkast til ferðavinnukjakið

Vísandi til mítt fyrra lesarabræv, vil eg her greiða eitt sindur frá, hvussu lógaruppskotið um "Burðardygga Ferðavinnu" kann broytast til eitt frægari uppskot fyri okkum vinnurekandi.

Endamálið við lógini er, sambært uppskotinum, at "gera ferðavinnuna til eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin". Hetta vil Landstýri náa, við at frátaka okkum ferðavinnurekandi og bóndunum kring landið møguleikan at taka pening frá ferðafólkum og í staðin vil Landstýrismaðurin taka tilsamans 20 milliónir krónur inn í "Náttúruverndargjaldið", ið síðani skal deilast út aftur, minus eina meting av 1,5 millión í umsiting.

Sostatt koma í besta føri 9,25 milliónir út til kommununar, sum eftir lógaruppskotinum skulu hava ábyrgdina av náttúruni. Kommununar skulu somuleiðis gera gøtur har tað krevst.

Ein gøta út í hagar, har mong ferðafólk ganga, kostar millum eina og tvær milliónir fyri hvønn kilometur, alt eftir lendi og umstøðum annars. Tá er einans tilfar og grevstur íroknað. Maskinur, arbeiðsløn og annað kemur aftrat. Sostatt megna allar kommunur í landinum at fíggja tilsamans millum 4 og 9 kilometrar av gøtum við hesum Náttúruverndargjaldið. Bert út í Kallin á Kalsoy, ein farleið ið bara veksur hvørt ár, er tørvur á eini gøtu fyri 6 til 7 milliónir krónur, 9 til 11 milliónir, um hon skal gerast á besta hátt.

Um Klaksvíkar Kommuna fær alt náttúruverndargjaldið, fer hon kanska at kunna fíggja hesa gøtu sjálv, men tá gjaldið skal deilast millum allar kommunur, eftir einum býtislykli vit ikki kenna enn og sum kann broytast, alt eftir hvat hvør Landstýrismaður metir, kann tann gøtan væntast at taka millum 5 og 7 ár at fíggja við náttúruverndargjaldinum og eini 2 ár afturat til arbeiðið, so um eini 7 til 9 ár er hon væntandi liðug. Tað merkir, at um alt náttúruverndargjaldið hvørt ár fer til eina kommunu, so megnar tann kommunan at gera EINA gøtu tað árið.

Fær bóndin hinvegin loyvi at taka gongugjald frá øllum útlendingum, ið ynskja at fara í haga hansara, kann hann fíggja og gera fyrstu gøtuna upp á 2 ella 3 ár, um hann ger alt arbeiðið sjálvur.

Eg meti eitt Náttúruverndargjald verða eina áhugaverda og gongda leið, men tað eigur ikki at koma í staðin fyri verandi og vælvirkandi skipan við gongugjøldum. Hetta gjald kann í staðin geva kommununum eina henta inntøku, til at byggja neyðugt infrakervi, so ferðavinnan kann virka betri. Her hugsi eg serliga um parkeringsmøguleikar, kunningarstovur, almenn wc, ruskíløt og annað líknandi.

Eisini dámar mær tann partin, har kommunur saman við teimum ið hava hagan um hendi, gera eina Ferðavinnuætlan fyri økini, har nærri reglur og treytir blíva fastløgd, eins og ein yvirskipað meting av tørvinum fyri infrakervi, gøtum og annað kann skjalfestast og samskipast millum bóndan og kommununa. Har skal tó havast í huga, at áhugamálini hjá bóndanum mugu vigast hægri enn nakað annað.

Vit í ferðavinnunið ynskja ongantíð, at okkara áhugamál fáa hægri raðfesting enn áhugamálini hjá teimum, ið varða av høgum, bygdum og økjum, har vit vitja við okkara ferðafólkum. Kenna tey lokalu seg ikki hoyrd og ynski teirra vird, so kenna vit okkum sum óbodnar gestir og er tað ikki ein uppliving, ið vit vilja bjóða okkara ferðafólkum. Tað eigur altíð at vera okkara ábyrgd, at vit halda okkum til tað, ið tey lokalu ynskja fyri sín heimstað. Lógaruppskotið leggur upp til tað øvugta, har

gesturin skal kunna fara sum teimum lystir og mutar bóndin ella bygdafólkini ímóti, ja so fellur straffur alt eftir sinnalagnum hjá Landstýrismanninum.

Lat meg sláa heilt fast við sjey-tumma seymi! Okkara náttúra er tað, ið útlendsku ferðafólkini ynskja at uppliva! Ein lóg, ið gevur útlendingum frítt at fara allastaðni teimum lystir, uttan nakra veruliga avmarking, er náttúruoyðandi.

Eg veit væl, at í lógaruppskotinum eru náttúruverndir við, so sum at tað er bannað at órógva djóralív, taka egg, steinar, plantur og annað, men hetta er í veruleikanum sum at sletta vatn á gás. Uttan so at løgreglufólk blíva sett út í náttúruna fyri hvørjar 100 metrar, so er lógin einans ein áheitan og ikki nøkur forðing. Eg veit væl, at summi siga at skelting og kunning fyribyrgja slíkum atburði, men tað samsvarar ikki við veruleikan ella okkara praktisku royndir við ferðafólkum. Einasta sum virkar, er eftirlit á staðnum og einasti handfariligi háttur at fremja hesa lógaráseting í verkið, er við at krevja at ein staðkendur og/ella góðkendur ferðaleiðari er við á øllum túrum hjá útlendingum út um bøgarðarnar.

Eg vil líka nevna nøkur fá dømi av mongum, ið eg persónliga havi upplivað við ferðafólkum kring landið, sum prógva at skelting og kunningarfaldarar ikki virka:

Eg havi mangan sæð fólk flogi við dronum, meðan dronutaska teirra stóð styðja upp móti skeltinum ið bannar dronuflúgving í økinum, eisini úti í Mykinesi.

Eg havi mangan sæð fólk stigi upp um girðingar og tráð og beint framvið skeltum, ið banna gongd á bønum, stutt áðrenn bóndin skal til at sláa bøin.

Eg havi sæð riðil av útlendingum, uttan føroyskan ferðaleiðara, gingið seg beint inn í fjallgongur og spjatt allan seyðin, so fjallgongan spjaddist.

Eg havi upplivað útlendskan bólk, ið flennandi stóð kring ein persón, ið hevði allan armin inni í lundaholu í Mykinesi, meðan tey brosandi greiddu mær frá, at tey einans ynsktu at taka pisuna út eina løtu, so tey kundu taka myndir av henni.

Eg havi upplivað ferðafólk runnið eftir seyði fyri at fanga eina ær og lamb hennara, fyri síðani at draga tey til ein stóran stein, so tey kundu taka myndir saman við teimum.

Hettar og mangt afturat havi eg upplivað, har ferðafólk leggja alt vit, skil og kunning til viks, tí allarheilagasta myndatøkan vigar hægri enn atlit til náttúru og enntá egið lív og heilsu. Tey ganga ytst á eggini ella niðri í fjøruni, har lív teirra eyðsæð er í stórum vanda, hóast forboðs- og ávaringarskeltir. At ongin ólukka er hend enn, er eitt undir, ið vit skulu vera sera takksom fyri.

Ein slík ólukka skal bert henda eina ferð, so er skaðin óbótaligur fyri ferðavinnuna.

Tí vil eg heita á Landstýrismannin um ikki at taka møguleikan frá bóndrunum at taka gongugjøld, men heldur at seta í lógina, at øllum er frítt at fara eftir gøtum og rásum í haganum, so leingi tey hava goldið fyri tað og hava staðkendan og/ella góðkendan ferðaleiðara við sær, serliga har tað kann standast vandi á leiðini.

Jógvan Hovshólm

Stjóri í Faroeway Adventures, ferðaskrivstova og útferðaveitari í Føroyum

Triða íkast til ferðavinnukjakið

Vísandi til míni fyrru lesarabrøv, vil eg her greiða eitt sindur frá, hvussu ferðavinnan virkar framm í tíð og krevur langtíðaratlit og stabilitet, fyri at kunna virka. Eisini vil eg koma inn á tað manglandi infrakervi, ið er neyðugt fyri at ferðavinnan skal kunna virka á besta hátt.

Vit í ferðavinnunið sum veita útferðir, virka langt framm í tíð. Longu í marts mánaði skulu okkara ferðatilboð, prísir og treytir helst liggja klár til árið eftir. Hetta skal skiljast so, at vit longu nú, í februar 2024, sita og smíða útferðir, pakkar, prísir og annað søtutilfar saman, til ferðafólk ið væntast at koma til landið í 2025. Longu nú eru útlendskar ferðaskrivstovur byrjaðar at biða um tilfar til hvat vit koma at bjóða í 2025 og summi enntá til 2026. Tískil er tað av alstórum týdningi, at øll skilja at ongar broytingar mugu koma dag frá degi til dags ella við styttri skotbrái enn eitt til tvey ár framm. Hetta tykjast hvørki politikkarar ella tey, ið dagliga geva teimum ráð um ferðavinnuna, at skilja.

Lógaruppskotið um "Burðardygga Ferðavinnu" er enn eitt dømi um, at landsins myndugleikar, lóggevar og ráðgevar, als ikki hava skilt hvussu ferðavinnan virkar, tí hendan lógin skal koma í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, eftir ætlan longu í summar. Kommunur skulu so, saman við bóndunum, verða liðug við teirra ferðavinnuætlanir 1. januar 2025 og endaliga góðkennast av Landstýrismanninum 1. juni 2025, mitt í háárstíðini hjá ferðavinnunið.

Tað merkir, at vit ferðasmiðir ikki kunnu gera nakrar útferðir, tilboð ella prísir meira enn nakrar vikur framm, tí vit vita ikki hvussu lógin blívur ella nær hon kemur í gildi og júst hvussu hon kemur at ávirka okkara virksemi og tær avtalur, ið vit hava havt við bóndur í áravís.

Eisini leggur lógin upp til, at Landstýrismaðurin skal gera eina "standardavtalu", ið vit og bóndin skulu virka eftir. Hettar merkir, at okkara samstarv við bóndur skal góðkennast av Landstýrismanninum, ið situr við einum defakto vetorætti, um hvat vit kunnu taka frá okkara ferðaliðum og gjalda bóndanum. Ongin onnur vinna í landinum, ella í nøkrum frælsum landið yvirhøvur, hevur tílíka mikrostýring av eini vinnugrein, stýrda so avgjørt av politiska myndugleikanum. Eisini byggir hendan mannagongdin á enn meira umsiting, bæði innan landsmyndugleikar og serliga fyri kommunur, ið ikki tænir ferðavinnunið til nakran fyrimun. Tá vit skulu gera eina avtalu, so má "avgreiðslutíðin" vera so skjót sum til ber. At tað er vikuskiftið, frídagar ella summarferia kunnu vit ikki bíða eftir.

Um verandi lógaruppskot um "Burðardygga Ferðavinnu" ella aðrar lóggávur, ið ávirka ferðavinnuna, skulu blíva viðtiknar av Løgtinginum í ár, eiga tær tískil ikki at fáa gildi fyrr enn 1. januar í 2025 ella helst ikki fyrr enn 1. januar í 2026, so vinnan hevur tíð og møguleika at tilpassa seg og síni tilboð til lógina. Allar lógir og broytingar mugu sostatt fáa gildiskomu minst 1 ella helst 2 ár eftir kunngerð, um tær ávirka ferðavinnuna. Alt annað skapar eina óneyðuga óvissu og stúran, ið einans oyðileggur ferðavinnuna, heldur enn at hjálpa henni at vaksa og tillaga seg.

At koma sum ketta upp úr høvdatrog og tveita eitt uppskot til hoyringar, ið skrykkir alt verandi grundarlag undan samstarvi og útferðum, er ikki til nakran bata ella fyrimun hjá ferðavinnunið.

Eitt annað eg vil koma inn á, og sum "Náttúruverndargjaldið" eisini kundi fari til, heldur enn at frátaka bóndrum møguleikan at taka gongugjald, er til vegir, tunlar og farleiðir, har mest vitjaðu støðini eru í landinum. Okkara vegakervi er sum heild gott, men manglandi viðlíkahald, óneyðuga smalir vegir og annað er til stóran bága og vanda.

Eitt rímiliga feskt dømi er vegurin til Kirkjubøar. Har gjørdi Landsverk ein nýggjan veg, men noktaði at breiðka hann tað allarminsta, tí "teir mettu ikki tørvur var á tí". Hesin vegur er ein av mest vitjaðu í landinum av stórum ferðafólkabussum! Hvørja ferð Norrøna kemur á Havnina, koyrir ein langur riðil av útlendskum bussum til Kirkjubøar. Ógjørligt er at víkja á vegnum, um nú til dømis býarbussurin ella annar ferðafólkabussur kemur ímóti teimum á vegnum. Har noyðist annar ~~se~~ at bakka allan vegin oman aftur í bygdina ella út til høvuðsvegin, tí útlendsku bussførararnir duga/tora ikki at bakka á smala vegnum. Landsverk vildi ikki eingang víðka møtiplássini.

Gongur leiðin norður til Gjáar, Saksunar ella Tjørnuvíkar, er (ó)skilið ofta tað sama. Eisini her møtir tú útlendingum í leigubili, sum ikki duga at víkja ella tora at bakka. Samstundis sita okkara ferðafólk hjartkipt og rópa, tí tey vænta at bussurin koppar av vegnum hvørja løtu, tí vit mugu bakka ella kroysta okkum hagar, ið vit í veruleikanum ikki passa við bussinum. Bakka útlendingarnir, so enda teir ofta í veitini, har tey so mugu hjálpast uppaftur. Alt meðan tey hava stongt vegin av fyri allari ferðslu, tí ongin sleppur framvið á smala vegnum.

Á Kalsoynni er støðan munandi verri. Okkara felag hevur nógv av sínum virksemi á Kalsoy, har vit í tvey ár nú eisini hava havt bussar fast í oynni, sum fastbúgvandi kalsoyingar koyra fyri okkum. Ætlanin var at hjálpa oynni og kommununi, við at bjóða ein annan møguleika til ferðafólkini, enn at tey tóku leigubil við og yvirfyltu oynna við akførum.

Úrslitið er so sum so, tí bussarnir noyðast ofta av oynni aftur og á verkstað, tí vánaligu vegirnir knúsa fjaðrar og annað á teimum. Ein stór og óneyðug eykaútreiðsla, ið kundi sloppist undan, um myndugleikarnir og politiska skipanin ikki hevði forsømt vegakervið í oynni í skjótt 40 ár. Tað er nú lívshættisligt at koyra í oynni, tí ikki bert skrædnar bakkin undan vegnum manga staðni, men nú rapar grót undan loftinum í tunlunum har, eins og ikki eitt rulluportur á oynni er heilt og trygt at koyra um.

Síðsta har úti er nú, at SSL saman við VFI fremja eitt marknaðarføringsátak, ið skal flyta sum flest av ferðafólkum úr privatum ferðamøguleikum og yvir í almennu farleiðinar.

Hvussu sampakkar tað við endamálsorðingina og føgru orð Landstýrismansins, at ferðavinnan skal tryggjast og vaksa um inntøku og vinnumøguleikar hennara? Har lekur alvorliga millum føgru orðini (teori) og veruleikan (praksis).

Í stuttum, her eru so nógv og alneyðug átøk, ið tað almenna má fara í holt við og fáa í rætt lag, fyri at ferðavinnan skal kunna halda áfram bara við verandi virksemi. At áleggja útlendingum umhvørvisgjald hjálpir kanska eitt vet fíggjarliga, men at nokta bóndum at taka gongugjøld og at loyva øllum fría gongd í haga eru avgjørt IKKI nøkur átøk ið hjálpa!

Jógvan Hovshólm

Stjóri í Faroeway Adventures, ferðaskrivstova og útferðaveitari í Føroyum

LM-099/2023

Fjórða íkast til ferðavinnukjakið

Vísandi til míni fyrru lesarabrøv, vil eg her greiða eitt sindur frá, hvussu lógaruppskotið hægst sannlíkt fær álvarsliga neiliga ávirkan á ferðavinnuna við gildiskomu.

Sum lógaruppskotið sær út nú, vænti eg at Landstýrismaðurin vil royna at fáa lógina gjøgnum Løgtingið áðrenn summerferiuna. Grein 17 í lógini sigur, at lógin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Frá tí degi lógin er kunngjørd, er hon jú galdandi. Samstundis vil Landstýrismaðurin, at kommununar hava tíðarfreist til 1. januar 2025, at koma við sínum ferðavinnuætlanum og hevur givið sær sjálvum freist til 1. juni 2025 at góðkenna hesar. Hettar merkir aftur, at hesar ferðavinnuætlanir sostatt ikki fáa virkna, fyrr enn 1. juni næsta ár. Her eru stórar óvissur, ið Landstýrismaðurin noyðist at svara okkum ferðavinnurekandi uppá, so okkara virksemi ikki skal haldast í ógvusligari og oyðileggjandi óvissu í 1½ ár framm.

Landstýrismaðurin legði á kunnandi fundi í Finsen tann 14. marts upp til, at "vit ið funnust at" ikki skuldu lesa lógarinnar paragrafir, men viðmerkingarnar til lógina í staðin. Hagani sá man hansara ætlan við lógini, sambært honum. Hettar er tó ein sera óseriøs viðmerking, tí kemur tað til skarpskeringar í rættarskipanini ella við løgregluni, so er tað júst lógarinnar paragrafir, ið eru altavgerðandi fyri dómsúrskurðinum og ikki "hvat Landstýrismaðurin meinti tá hann skrivaði lógina".

Havi fingi at vita frá nøkrum kommunum, at teirra tulking av lógini er so, at frá tí degi lógin fær gildiskomu og til ferðavinnuætlanirnar hjá kommununum eru góðkendar og kunngjørdar, verður tað einans loyvi at ganga í haga eftir verandi varðagøtum og ikki aðrastaðni.

Hettar niðurleggur í so fall alt virksemi og inntøkur, ið nógvir bøndir hava av ferðavinnuni í dag. Eisini steðgar hettar mangt virksemi hjá okkara fyritøku, ið bjóðar gongutúrar kring landið í samstarvi við avvarðandi bøndur.

Fyrsti spurningurin er so, nær ið Landstýrismaðurin ætlar at kunngera lógina?

Vil Landstýrismaðurin sostatt ikki kunngera lógina fyrr enn 1. juni 2025, ella ætlar hann at vit ferðasmiðir skulu virka eftir lógarinnar ásetingum, til ferðavinnuætlaninar væntandi koma næsta ár?

Hvussu við útferðamálum, har kommunan ikki megnar at gera ella fíggja allar slíkar ferðavinnuætlanir? Ætlar Landstýrismaðurin tá at tosa beinleiðis við avvarðandi bøndir um lokala ferðavinnuætlan, ella koma tey økini bert at liggja deyð fyri ferðavinnu aftaná freistina?

Vil Landstýrismaðurin bera so í bandið, at ferðavinnusamstarvi millum bøndur og útferðaveitarar kann halda áfram, eins og áður, til ferðavinnuætlaninar hjá kommununum eru lidnar og lýstar?

Í teimum førum har varðagøtur ikki eru til ætlaðu og verandi útferðarmál, ætlar Landstýrismaðurin at broyta lógina, so verandi virksemi og ferðsla gjøgnum hagar kann halda áframm eftir núverandi leisti, til ferðavinnuætlaninar eru lýstar, har uppií eisini at loyva verandi gjaldsportrum framhaldandi at virka?

Um ikki, skulu vit útferðaveitarar og bóndur so steingja hesar farleiðir til gøtur eru gjørdar av kommununum?

Hvørja tíðarætlan sær Landstýrismaðurin vera realistiska, til allar avvarðandi kommunur megna at hava bygt tær gøtur, ið krevjast til at tryggja ferðandi til gongu til øll útferðamálini kring landið?

Hvussu ætlar Landstýrismaðurin at fíggja neyðugu gøturnar, har kommunan ikki hevur fíggjarliga orku til at byggja slíkar gøtur? Fær bóndin tá loyvi at krevja gongugjøld sum áður, ella skulu tær farleiðirnar steingjast, til Landstýrismaðurin hevur tikið um endan?

Ætlar Landstýrismaðurin at veita endurgjald til bóndir og útferðaveitarar, fyri mista inntøku av møguligum stongsli av útferðamálum, ið lógaruppskotið í verandi líkið fer at hava við sær?

Ætlar Landstýrismaðurin at veita bóndum endurgjald fyri økt slit, mista inntøku frá gongugjøldum, mist beiti, órógvan og íløgur, ið lógaruppskotið ger óhaldbarar?

Hvussu ætlar Landstýrismaðurin at tryggja, at verandi vaksandi tal av útlendskum ferðafólkum ikki verður neiliga ávirka og minkar, um tey mest vælumtóktu útferðamál blíva stongd í 1½ ár ella longri vegna hettar lógaruppskot?

Fer Landstýrismaðurin at taka okkum útferðaveitarar við upp á ráð og taka okkara viðmerkingar í álvara, tá ferðavinnuætlanir skulu góðkennast?

Fer Landstýrismaðurin at taka okkum útferðaveitarar við sum ráðgevar til komandi lógaruppskot og -broytingar, ið viðvíkja ferðavinnunið í Føroyum? Ella fer hann framhaldandi einans at lurta eftir teimum áhugabólkum, ið onki hava við okkara slag av ferðavinnu at gera ella vitan um hesa, eins og hann hevur til hettar lógaruppskotið?

Svarini til hesar spurningar hava ómetaliga stóra ávirkan á okkara virksemi, bæði í ár, næsta ár og eftir 1. juni 2025. Veit ikki um Landstýrismaðurin er vitandi um, hvussu okkara virksemi riggar og hvørjar álvarsligar avleiðingar, avmarkingar og niðurlagingar hettar hevur fyri okkum.

Sum áður sagt í einum av fyrru lesarabrøvum mínum, virkar ferðavinnan langt fram í tíð. Okkara útferðir í ár og næsta ár liggja sum er í stórari óvissu, ið ger tað ómøguligt hjá okkum at játta bíleggingar, bjóða útferðir, finna prís fyri útferðir ella sum so at útinna alt okkara kjarnuvirksemi, til vit vita júst hvussu lógin blívur og hvussu hon ávirkar okkum í ferðavinnunið.

Sum lógaruppskotið sær út í dag, síggja vit einans eina stóra niðurgongd í okkara virksemi fyri framman. At kappast við ókeypis gongd í haga, er ein stór og sera álvarsom avbjóðing, ið hevur alstórar neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri ferðavinnuna sum heild, bæði fyri okkum útferðasmiðir og landbúnaðarferðavinnuna. Hetta tykjast hvørki Landstýrismaðurin, hansara umsiting, hansara kjarnuráðgeving, VFI ella onnur skilja, ið hava verði við til at gjørt verandi lógaruppskot.

Í viðmerkingunum til lógina, á síðu 5 av lógaruppskotinum, stendur brotið "Yvirskipaða endamálið er enn sum áður at gera ferðavinnuna til eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin". Tað meta vit ikki, at verandi lógaruppskot leggur upp til á nakran hátt. Heldur niðurlagar uppskotið alla verandi útferðavinnu og gevur henni kapping við ókeypis almennum tilboðum, ið ferðavinnan fer at tapa og tískil fer inntøkan í ferðavinnunið eisini at minka, ikki økjast. Einasti sum vinnur upp á stutt sigt, er landskassin, ið fær inntøkuna av Náttúruverndargjaldinum og umsitingina av hesum. Fyri bóndur, útferðasmiðir og øll tilknýtt starvsfólk og samstarvsfelagar,

er banni av gjaldsportrum eisini ein álvarsamur inntøkumissur, ið tilsamans fer at minka um peningaliga umsetningin í ferðavinnunið.

Fyri at vísa á eitt groft dømi um hendan inntøkumiss, so lat meg seta eitt einfalt roknistykkið upp: Inntøkan av Náttúruverndargjaldinum, ið Landstýrismaðurin ynskir skal koma í staðin fyri gongugjøldini og gjaldsportrini, blívur eftir verandi metingum 20 milliónir krónur í 2026.

Um øll hesi somu ferðandi, ið VFI vænta koma til landið í 2026, gjalda verandi gongugjøld til 4 teir mest vitjaðu bóndirnar, blívur bert MVG-inntøkan hjá Landskassanum av hesum gjøldum 26 milliónir krónur.

Um einans 15% av sama talið av ferðandi í 2026 gjalda gongugjøld til tey 4 best umtóktu útferðamál, blívur hendan (skjótt ólógliga) inntøkan í útjaðarinum heilar 26 milliónir krónur.

Hesi gjaldsportur ynskir Landstýrismaðurin skulu blíva ólóglig og ætlar at bóndirnir kring landið skulu kappast við eitt ókeypis alternativ. Tá tapir bóndin og náttúran í haga hansara kappingina.

Um tað hinvegin blívur avgjørt krav, at fyri at sleppa í hagan krevst góðkendur/staðkendur føroyskur ferðaleiðari, um tey nakrastaðni skulu út um bøgarðarnar, geva hesi somu 15% av teimum ferðandi eina inntøku til bóndurnar og teirra ferðaleiðarar áljóðandi 36 milliónir krónur.

Sostatt meta vit ikki, at lógin í hesum sambandið livir upp til ásetingina í Grein 1 av lógini, ið jú leggur upp til at lógin m.a. skal tryggja "inntøkur og vinnumøguleikar" hjá okkum øllum kring landið.

Um Landstýrismaðurin so av ideologiskum orsøkum ikki ynskir at bóndir, útferðaveitarar ella aðrir samstarvsfelagar skulu kunna vinna pening upp á "fólksins ogn", ið hann rópar hagarnar (bæði landsjørð og privata ogn) í Føroyum (sum hann legði upp til á almenna fundinum í Finsen tann 14 marts í ár), so eigur hann ikki at orða endamálið í lógini soleiðis, tí tá blivur tann greinin ein beinleiðis lygn.

Vit vilja tí heita á Landstýrismannin at melda greitt út, hvat politiska ynski hansara er!

Ynskir hann at smíða eina lóg, ið tænir bóndum, útoyggjasamfeløgum, smáplássum, útferðasmiðum innan ferðavinnuna, avvarðandi vinnugreinar sum veita tænastur og vørur til hesi og øll tey starvsfólk, ið eru knýtt at øllum hesum virksemi?

Ella ynskir hann at føra vinstravendan ideologiskan politikk, ið tænir landsins umsiting, meðan vinna, bóndir, starvsfólk og tilknýttar vinnugreinar missa stórt virði og inntøkur av hondum?

Jógvan Hovshólm

Stjóri í Faroeway Adventures, ferðaskrivstova og útferðaveitari í Føroyum

LM-099/2023

Notat

Udlændinge- og Integrationsministeriet

Styrelsen for International Rekruttering og Integration

Modtager(e): Útlendingastovan

11. juni 2020

Postadresse:
Postboks 304
2500 Valby

Besøgsadresse:
Carl Jacobsens Vej 39
2500 Valby

Tel 7214 2000
Mail siri@siri.dk
Web www.uim.dk

CVR-nr. 36977191

Sagsbehandler

Tel 72 14 23 10
Mail olk@siri.dk

Sags nr
Akt-id 191735

Generel vejledning om de udlændingeretlige forhold på Færøerne i relation til turismebranchen

Útlendingastovan har på vegne af Visit Faroe Islands anmodet Styrelsen for International Rekruttering og Integration (SIRI) om en skriftlig redegørelse for de gældende regler og praksis vedr. opholds- og arbejdstilladelser for turistbranchen, herunder særligt for turistguides, buschaufførere som kører med turister, samt turister som arbejder for værter mod kost og logi.

SIRI er endvidere blevet bedt om at redegøre for ansøgningsprocessen for personer i førnævnte kategorier, som ønsker at søge om opholds- og arbejdstilladelse.

SIRI kan oplyse følgende:

Ansøgningsprocessen generelt

Ansøgning om opholds- og arbejdstillade sker ved indgivelse af et ansøgningsskema til SIRI enten direkte via kontaktformularen på vores hjemmeside (nyidanmark.dk), via den lokale danske repræsentation i udlandet, eller ved færøsk politi.

En ansøgning om opholds- og arbejdstilladelse for tredjelandsstatsborgere, eller til en ikke-forhåndsgodkendt virksomhed har et servicemål på op til 3 måneder. Ansøgninger om opholds- og arbejdstilladelse efter EU-ordningen til en forhåndsgodkendt virksomhed har et servicemål på op til 10 dage.

Ansøgninger om opholds- og arbejdstilladelse på Færøerne er ikke gebyrpålagte. Danske ambassader og lokale visumstationer i udlandet kan dog kræve lokale gebyr for brug af deres tjenesteydelser.

Statsborgere fra et EU-medlemsland, kan benytte sig af FO/AR9 ansøgningsblanketten.
Statsborgere fra lande udenfor EU kan benytte sig af FO1 ansøgningsblanketten.

Mere vejledning om ansøgningsprocessen kan findes på vores hjemmeside www.nyidanmark.dk.

Generelt om reglerne for opholds- og arbejdstilladelser på Færøerne

Statsborgere fra nordiske lande skal ikke søge om opholds- og arbejdstilladelse for at bo og arbejde på Færøerne. Dette følger af udlændingelovens § 1. Med nordiske lande forstås Danmark (inkl. Grønland/Færøerne), Island, Sverige, Norge og Finland.

Lønnet og/eller ulønnet arbejde på Færøerne kræver arbejdstilladelse, jf. § 13, stk. 1 i udlændingeloven. Det følger af § 15, stk. 1 at der kan knyttes nærmere betingelser til en arbejdstilladelse på Færøerne.

Det bemærkes i den forbindelse, at der ikke eksisterer nogen form for tidsmæssig "bagatelgrænse" fsva. antallet af dage et bestemt arbejde skal udføres.

Opholdstilladelse efter udlændingelovens § 9, stk. 2 nr. 3 (Anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden af udlændingeloven for Færøerne) kræver, at der er væsentlige erhvervsmæssige eller beskæftigelsesmæssige hensyn, som taler for opholdstilladelse. Som udgangspunkt betyder det, at en udenlandsk ansøger skal være tilbudt fuldtidsbeskæftigelse (40 timer ugentligt) af en arbejdsgiver. Derudover skal de tilbudte løn- og ansættelsesvilkår være sædvanlige efter færøske forhold.

Det er en betingelse for den meddelte opholdstilladelse, at udlændingen arbejder i overensstemmelse med sin kontrakt og ikke skifter arbejdsgiver.
Der er ikke noget til hinder for at arbejdsgiveren er placeret i udlandet, så længe arbejdsstedet eller 'driftstedet' er placeret på Færøerne og de tilbudte løn- og ansættelsesvilkår for arbejdet er sædvanlige efter færøske forhold.

En opholdstilladelse efter § 9, stk. 2, nr. 3 skal være opnået inden indrejse til Færøerne, medmindre ganske særlige grunde taler herfor, jf. § 9, stk. 7.

Opholds- og arbejdstilladelse efter § 9, stk. 2, nr. 3 meddeles med henblik på midlertidigt ophold i en periode på højst 1 år ad gangen med mulighed for forlængelse.

EU-ordningen (Lov 462 af 17. juni 2008, senest ændret ved lov 731 af 26. juni 2014), giver mulighed for, at statsborgere fra et EU-medlemsland (undtagen EØS lande eller Schweiz) kan søge om opholds- og arbejdstilladelse efter nogle lempeligere regler. Ordningen giver endvidere virksomheder på Færøerne mulighed for at søge om forhåndsgodkendelse til ansættelse af statsborgere fra et EU-medlemsland efter anmeldelse.

Der stilles krav om, at udlændingen er tilbudt ansættelse på minimum 30 timer ugentligt. Der skal være tale om en ansættelse som enten sker efter overenskomst eller som kan anses for sædvanlige efter færøske løn- og ansættelsesvilkår.

En statsborger fra et EU-medlemsland kan indgive anmeldelse af et ansættelsesforhold på Færøerne ved en forhåndsgodkendt virksomhed. Når en statsborger fra et EU-medlemsland har indgivet en anmeldelse af ansættelsesforholdet, har pågældende ret til at påbegynde arbejdet uden at afvente færdiggørelse af sagsbehandlingen.

Opholdstilladelse efter EU-loven meddeles med henblik på midlertidigt ophold for en periode på højest 1 år ad gangen med mulighed for forlængelse.

Efter udlændingeloven § 9, stk. 2, nr. 4, kan opholdstilladelse meddelelse hvis ganske særlige grunde taler derfor. Bestemmelse anvendes efter praksis til at meddele opholdstilladelse med henblik på midlertidigt ophold på Færøerne for studerende, praktikanter, au-pairs, volontører (velgørenhedsarbejde).

Medfølgende familiemedlemmer til udlændinge med opholds- og arbejdstilladelse på Færøerne, eller med opholdstilladelse som studerende på Færøerne, meddeles opholdstilladelse efter § 9, stk. 2, nr. 4.

Om opholds- og arbejdstilladelse som selvstændig erhvervsdrivende

Der kan gives opholds- og arbejdstilladelse efter udlændingelovens § 9, stk. 2, nr. 3, med henblik på selvstændig erhvervsvirksomhed på Færøerne.

Det er følgelig en betingelse for at få opholdstilladelse som selvstændig erhvervsdrivende, at der er erhvervsmæssige og beskæftigelsesmæssige hensyn, som taler for at imødekomme en ansøgning. Virksomheden skal efter praksis have en innovativ forretningside, som kan bidrage til vækst og nye arbejdspladser på Færøerne, og der skal være særlige færøske erhvervsinteresser i, at virksomheden etableres der. Derudover skal landsstyret (Útlendingastovan), efter høring, give positiv udtalelse om at den selvstændige meddeles en tilladelse.

Man kan normalt ikke forvente at få opholdstilladelse på baggrund af selvstændig erhvervsvirksomhed indenfor detailhandel, restaurationsvirksomhed, mindre import- og eksportvirksomheder.

Om Turistguides på Færøerne

Opgaver udført af 'turistguides' anses efter gældende praksis for at være arbejde omfattet af udlændingelovens § 13, stk. 1 og kræver derfor arbejdstilladelse. Turistguides ansat i en færøsk virksomhed eller udenlandsk virksomhed kan søge om at få meddelt opholds- og arbejdstilladelse efter de gældende regler.

Normalt kan selvstændige turistguides ikke forvente at få meddelt opholds- og arbejdstilladelse efter de gældende regler, idet at de fleste turistguides ikke for-

venter at ansætte andre end dem selv og kun gør brug af det lokale erhvervsliv i et begrænsede omfang.

Der kan dog i enkeltstående tilfælde, efter en konkret og individuel vurdering, være grundlag for at meddele tilladelse til selvstændige turistguides. Den selvstændige skal dog kunne dokumentere at deres virksomhed har en innovativ forretningside, som kan bidrage til vækst og nye arbejdspladser på Færøerne og at der foreligger særlige færøske erhvervsinteresser i at virksomheden etableres.

Om turistbuschauffører

Ifølge bekendtgørelsens § 34, stk. 1, nr. 3 er personale i udenlandske biler i international trafik fritaget for arbejdstilladelse. I praksis er bestemmelsen udvidet til også at omfatte turistbuschauffører, men kun i det omfang at kørslen er mellem udlandet til/fra hotellet.

Kørsel udover det, vil derfor efter den nuværende lovgivning og praksis ikke være fritaget efter udlændingebekendtgørelsen § 34, stk. 1, nr. 3 og der skal således søges som en opholds- og arbejdstilladelse, hvis der er tale om transport rundt på Færøerne

Vi skal i den forbindelse bemærke, at der er mulighed for at udvide fortolkningen af denne fritagelsesbestemmelse, således at turistbuskørsel i en afgrænset form kan blive omfattet af bestemmelsen. En udvidet fortolkning af bestemmelsen kan ske efter aftale sammen med landsstyret på Færøerne.

Om frivilligt arbejde og arbejde mod betaling af kost og logi

Efter praksis anses arbejde mod betaling af kost og logi, ikke for sædvanlige lønvilkår på færøske arbejdsmarked. Det vil således ikke være muligt at opnå opholds- og arbejdstilladelse pba. af en aftale, hvor en udlænding udfører arbejde (ufaglært eller faglært) mod betaling af kost og logi. Af samme årsag, kan frivilligt arbejde ikke anses for at være sædvanligt.

Det er ej heller muligt efter gældende praksis at få tilladelse som selvstændig erhvervsdrivende eller freelancer til selv at udføre ufaglært og/eller ufaglært arbejde.

Der er således efter det gældende regelsæt, ikke mulighed for at få meddelt opholds- og arbejdstilladelse, med henblik på frivilligt arbejde, eller arbejde mod betaling af kost og logi.

Særligt om Volontørarbejde

Efter praksis kan der meddeles opholdstilladelse pba. af volontørarbejde jf. udlændingeloven § 9, stk. 4 (ganske særlige hensyn).

Betingelserne for at få opholdstilladelse som volontør på Færøerne, er de samme som i Danmark, dog med enkelte lokale modifikationer.

Volontørarbejdet kan foregå inden for bl.a. miljø, kunst, kultur, arbejde med børn, unge, ældre, idræts- og fritidsaktiviteter. Almindeligt lønarbejde, som udføres for en social eller humanitær organisation, er ikke socialt/humanitært arbejde (f.eks. rengøring).

Da det ikke er muligt at få tilladelse til volontørarbejde til almindeligt faglært, eller ufaglært lønarbejde, finder bestemmelsen ikke anvendelse for frivilligt arbejde eller arbejde mod betaling af kost og logi inden for turismebranchen.

Om Visit-Faroe Islands årlige volunturismearrangement

Tilladelse til deltagelse i det årlige Visit Faroe Islands arrangement, meddeles efter særlig aftale mellem SIRI og Útlendingastovan.

Tilladelse til deltagelse i Visit Faroe Islands arrangementet, meddeles efter Udlændingelovens § 9, stk. 2, nr. 4 (ganske særlige hensyn).